# VESTMANNA KOMMUNA

Bakkavegur 16 | Postboks 91 | 350 Vestmanna

## NÁMSFRØÐINGUR TIL LÁTIPÍPUNA

Søkt verður eftir námsfrøðingi til Útibarnagarðin í Látipípuni at byrja 1. november ella eftir nærri avtalu. Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.

Um eingin námsfrøðingurin søkir, verður hjálparfólk sett í starvið.

**Vit vænta, at:**
- tær dámar at vera úti saman við børnum, og at tú dugir at síggja styrkirnar hjá hvørjum einstakum barni
- tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur góð samstarvsevnir
- tú ert opin og erlig/-ur í samskiftinum við onnur

**Vit kunnu bjóða:**
- ein grønan stovn í náttúruumhvørvi við góðum møguleikum fyri túrum í á, haga og fjøru
- ein stovn, har dentur verður lagdur á alla tíðina at menna arbeiðið við børnunum
- ein starvsfólkabólk, sum er opin fyri nýggjum avbjóðingum

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Núverandi setanarstaður er Látipípan. Setanarøkið er dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Vestmanna Kommunu á tlf. 470 110.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum og viðmælum skal vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 3. oktober 2008 kl. 12.

**Látipípan** er ein stovnur við útbarnagarði til 5-7 ára gomul børn og frítíðarstovu til børn í 1.-2. flokki.

Frítíðarstovan er inni á Fjørð – tætt við Fossá, fjøruna og sandin.

Dentur verður lagdur á at geva børnunum fjølbroyttar upplivingar saman við javnaldrum, og at læra tey at virða hvønn annan.

Útibarnagarðurin er í Miðalsbrekku í vøkrum náttúruumhvørvi millum Hórðará og Gjógvará – tætt við hagan.

Dentur verður lagdur á at geva børnunum upplivingar úti í náttúruni, og at búgva tey til at fara í skúla.

---

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

## Bergur á Reynatrøð

| Opið er: | Børkuvegur |
|---|---|
| mánadag-hósdag frá kl. 9-16 | 620 Runavík |
| fríggjadag frá kl. 9-12 | Tlf. 448480 |

---

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

# Sjúkrarøktarfrøðilesandi

**Nýggjur flokkur byrjar 2. februar 2009**

**Útbúgving og møguleikar**
Útbúgvingin til sjúkrarøktarfrøðing er spennandi og avbjóðandi og tekur 4 ár. Hon gevur heitið bachelor í sjúkrarøktarfrøði – Bachelor of Science (BSc) in Nursing.

Sum útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur hevur tú nomið tær holla vitan og førleika at útinna sjúkrarøkt, soleiðis at tú veruliga upplivir, at tú kanst gera mun.

Útbúgvingin gevur tær fjølbroyttar starvs- og menningarmøguleikar bæði her á landi og uttanlands.

**Hølis- og lestrarumstøður**
Hølisumstøður og umstøður skúlans yvirhøvur eru avbera góðar. Sjúkrarøktarfrøðiskúlin húsast í nútímans hølum miðskeiðis í býnum. Alt tilfar og øll útgerð lúka tíðarinnar krøv.

Saman við 120 øðrum lesandi, sum ganga á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum og á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum og væl útbúnum lærarum og starvsfólki verður tú ein partur av einum virknum og vinarligum lestrarumhvørvi, har trivnaðurin er í hásæti.

**Lestrarvegleiðing**
Lestrarvegleiðari skúlans veitir vegleiðing og góð ráð. Teldupostbústaðurin er: anne.lise.winther@skulin.fo, tlf. 325 265.

**Umsókn**
Teldutøkt umsóknarskjal kann takast niður av heimasíðu skúlans, www.srfs.fo, ella tú ringir 352 250 og biður um at fáa tað sent í postinum. Á heimasíðuni kanst tú eisini lesa um upptøkutreytir o.a.

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 3. november 2008 og sendast til

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya
Jónas Broncks gøta 25
FO-100 Tórshavn

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo

---

# Hovs kvøldskúli

Treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning myndugleikanna, verða hesi skeið í Hovs kvøldskúla 2008/09.

| Lærugrein | Lærari | Telefon |
|---|---|---|
| Hondarbeiði | Jenny Petersen | 373475 |
| Veving | Jenny Petersen | 373475 |

Luttøkugjaldið er 300 kr.

Tilmelding hjá læraranum í seinasti lagi leygardagin 27. sep. 2008.

**HOVS KVØLDSKÚLI**

---

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

SKEIÐ Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA 2008-2009

## Próvskeið í enskum

a) Skeið til Cambridge First Certificate in English byrjar í Jónas Broncks gøtu 25 23. oktober í einum flokki við undirvísing hósdag kl. 13.00-16.00.

- Fortreytir: 10. floks støði ella samsvarandi kunnleiki, ávísur førleiki í at nýta málið, talað og skrivað.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

b) Skeið til Cambridge Certificate of Proficiency in English byrjar í Ovastovu í Nóatúni 22. oktober í einum flokki við un¬dirvísing mikudag kl. 9.00-12.00.

- Fortreytir: Staðið ”Advanced English”, málsligt students-, HF-, HH-prógv ella samsvarandi, góðan førleika at nýta málið.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

Próvtøkurnar verða í mai/juni 2009.

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni. Tilmeldingarfreistin er sett til 03. oktober 2008. Nemingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, sohvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

**Tilmeldingargjaldið er 1.000 kr.**

Fyri próvtøku í First Certificate in English gjalda næmingar 900 kr. og fyri próvtøku í Certificate of Proficiency in English 1.100 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

---

# Frá Sláturmiðstøðini í Haraldssundi

Nú er flettingartíð. Um tú ikki hevur tíð og orku, so fletta vit fyri teg og vit hava eisini neyðuga flutningsbilin.

Skjótt og væl úr hondum greitt.

Eisini selja vit fesk og røst krov.

**Ring: 21 67 47 ella 28 67 87.**

**Sláturmiðstøðin**
*...altíð ein tumma frammanfyri*

FJØRUVEGUR 1 · 785 HARALDSSUND

---

Lesið Sosialin -so eru tit við!